## Byrial gjørdi comeback

Johan Byrial Hansen gavst í fjør við fótbólti á høgum stigi. Arbeiðs- og familjuumstøður gjørdu, at hann gavst á superligaliðnum hjá AC Horsens. Sunnudagin var hann tó aftur at síggja á liðnum hjá AC Horsens, sum spældi ímóti AaB. Leikbann og skaðar høvdu við sær, at Johan Byrial Hansen var tikin inn á liðið aftur. Hann spældi í 57 minuttir, áðrenn hann var skiftur út. Byrial hevur verið hjálparvenjari hjá Danmarksseriuliðnum hjá AC Horsens, har hann eisini hevur spælt seinasta árið.



## Ikast-Bording vann

Ikast-Bording er annað felagið í finaluni í europeisku kappingini EHF Cup í kvinnuhondbólti, og danska felagið stóð seg væl í fyrru finaluni, sum varð spæld um vikuskiftið. Ikast-Bording spældi á heimavølli og vann dystin 35-30 ímóti russiska liðnum, sum verður roknað sum tað sterkara liðið. Ikas-Bording skal nú royna at verja fimm máls leiðsluna í seinnu finaluni, sum verður spæld í Mosvka tann 20. mai.

B36-Skála 1-1 (0-0):

# Perlumál í linligum dysti

*B36*

*Skála*



*Tað eydnaðist B36 at bjarga sær eitt stig í heimadystinum móti Skála. Men hóast fagnaðurin um útjavningina var stórur, so var talan kortini um vónbrot*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## John var nøgdur

Hóast Skála fyri fyrstu ferð læt mál fara ígjøgnum undir nýggja venjaranum, so var John Petersen ikki nakar ónøgdur maður eftir javnleikin móti B36. Felagnum, har John í sjey ár taldist millum berandi kreftirnar á liðnum.

- Sjálvandi er tað keðiligt at missa sigurin, tá tú ert somikið nær. Men eg haldi, at javnleikurin er eitt rættvíst úrslit, sigur venjarin, sum annars er væl nøgdur um avrikið.

- B36 lá langt afturi á vøllinum fyri steðgin. Men sum gestir í Gundadali hildu vit ikki, at tað var upp til okkum at skapa dystin. Eftir steðgin hendir kanska meira, tá B36 flytur spælið longur niðan, men vit halda teimum kortini frá møguleikum, og hatta kontra-málið hjá okkum er altso í heimsklassa. Tíverri fáa teir so eitt ordans trýst seinastu løtuna, og so fáa teir eitt mál, har vit tvær ferðir selja okkum í síðuni. Sjálvandi rakar Mikkjal eisini handan bóltin perfekt, og eg skal so ikki lasta Hans, at hann hesa ferð læt mál fara ígjøgnum, sigur John Petersen.

**-mørk**

**Skála var ávegis fimta sigrinum á rað, tá Mikkjal Thomassen við einum dundurskoti bjargaði vertunum javnleikin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

449 minuttir. Somikið leingi eydnaðist Skála at halda málið reint, um roknað verður frá seinna AB-málinum, tá Skála í fjórða umfari tapti 2-0 á heimavølli.

Síðani tá hevur bara gingið rætta vegin hjá Skála, sum hesa ferð var ávegis fimta sigrinum á rað.

Og tað var heldur ikki so nógv, sum bendi á, at B36 skuldi skora sunnudagin. Skála var fyrst og fremst komið til Havnar fyri at halda fast um javnleiki. Frá byrjan hildu teir nógvum fólki á egnari hálvu, og tá B36 heldur ikki tóktist at satsa nakað, gjørdist fyrstu trý kortini rættiliga linlig. Onkur hálvur møguleiki spurdist burtur úr bóltum, sum vóru oystir inn í brotsteigarnar, og ógvuliga sigandi var størsti kjansurin hjá B36, tá Curcic ta einu ferðina fór púrasta skeivur, men Sylla sendi tó hálvfluktaran himmalhøgt uppum.

### Mál í heimsflokki

Undirhaldsvirðið vaks nakað eftir steðgin. B36 royndi at flyta spælið longur niðan á Skála-hálvuna, men teimum vantaði tó neyðugu ferðina, sum skuldi opna verjuna hjá teimum gulu.

Enn var tað við deyðbóltum, at vandin var størstur, og ta einum ferðina var eisini um reppið, at Ove Nysted fekk sett høvdið á eitt hornaspark. Men bara 20 sekund seinni var bólturin ístaðin í B36-meskunum. Tað skuldi verið kravt við lóg, at fótbóltsvenjarar kring landið ogna sær avrit av sjónbandinum, tí talan var um eitt fyrimyndarligt dømi um kontra-spæl, tá hetta er allar vakrast. Levi Hanssen og Obi gjørdu skjótt av, tá bólturin varð sendir niðan, og við tveimum fyrstuferðssendingum var B36-verjan útspæld. Og tá Bogi Gregersen hevði spurtað seg fram í høgru, slepti annars leysi Levi bóltinum til enn betri stadda álopsfelagan, sum ikki gav Jákupi Mikkelsen nakran sum helst møguleika.

### Bakkaðu ov langt

Tað er væl skilligt, at Skálamenninir iðra seg um, at teir ikki hildu fast um leiðsluna, men fyrst og fremst, so hava teir sær sjálvum at takka í so máta. Seinasta korterið duttu teir nevnliga alt ov langt aftur á vøllin, og tað B36 møguleikan at leggja eitt massivt trýst. At Allan Mørkøre varð skiftur inn í álopið fyri verjuleikara, og at Ove Nysted varð tveittur fram í fremstu røð, økti sjálvandi um trýstið. Men tann stóri møguleikin tóktist kortini ikki koma.

Tolið hjá B36-fjepparunum mundi vera slitið nógv, tá málið loksins kom. Men talan var so sanniliga um eitt mál, sum var vert at bíða eftir. Í besta sambastíli streyk Santos ígjøgnum vinstra borð, har tveir verjuleikarar ikki megnaðu at fanga hann. Innleggið ferðaðist aftur um verjuspælararnar, og á brotsteigarmarkinum kanónfluktaði Mikkjal Thomassen bóltin upp í hornið. Fyri fyrst ferð mátti 16 ára gamli Hans Jørgensen í Formula-málið eftir bóltinum, men júst hatta skotið hevði nakar málverji í heiminum kunna vart fyri.

### Hóma heiðursmerkini

Seinastu løtuna royndi B36 at skora enn eitt mál, og tað var eisini um reppið, at hetta kom, men hesa ferð spældi hepnið ikki við í teirra parti. Javnleikurin merkir, at tað ikki eydnaðist at vinna seg á toppin í hesum umfarinum, og einki er at ivast í, at Kurt Mørkøre og hansara menn iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at gagnnýta møguleikan at vinna seg framum EB/Streym.

Hjá Skála var úrslitið helst at liva við. Men eisini teir iðra seg, tá teir nú vóru somikið stutt frá sigrinum. Enn ein sigur vildi veruliga flutt liðið upp móti heiðursmerkjastríðnum. Men megna teir at halda fast um góðu gongdina, sum hevur verið, so kunnu teir væl vinna seg har upp kortini.